Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Steffan Klein Poulsen, løgtingsmaður

Svarari: Uni Rasmussen, landsstýrismaður í fíggjarmálum

Evni: Skúvoy og farmur

Spurningar:

1. Hvussu nógvir túrar verða gjørdir til Skúvoyar við og eftir tungum farmi, sum Sildberin ikki megnar at flyta, um árið?
2. Hvørji skip hjá SSL røkja (tungu) farmatúrarnar til Skúvoynna?
3. Hevur SSL skipskapasitet til at økja um farmatúrarnar til Skúvoynna?
4. Hvat er kostnaðurin fyri at røkja verandi farmatúrar?
5. Hvat er eyka kostnaðurin av at tryggja Skúvoyingum ein farmatúr um mánaðin við tilkalling?
6. Hvat er eyka kostnaðurin av at tvífalda farmatúrarnar?
7. Fer tað at broyta fortreytirnar fyri farmi og sigling annars til Skúvoyar at Sandoyartunnilin letur upp?

Viðmerkingar:
Sildberin røkir sjóvegis rutuna til Skúvoyar, men er øgiliga avmarkaður í kapasiteti og kraft (hevur lítlan krana), tá tað kemur til tungan farm. Tí mugu onnur skip hjá SSL inn á rutuna fyri at flyta tunga farmin aftur og fram.

Sambært borgarum á oynni eru farmatúrarnir minkaðir nógv í tali, og eru teir ov fáir í mun til tørvin í dag. Ein av orsøkunum, sum hevur verið nevnd, er, at Ritan hevur havt ein týðandi leiklut, tá tað kemur til tunga farmin í Skúvoy. Eftir at hon bleiv flutt frá leiðini millum Havnina og Nólsoynna til at røkja rutuna úr Hvannasundi til Svínoyar og Fugloyar eru farmatúrarnir til Skúvoyar minkaðir nógv, tí at Ritan ikki hevur kunna verið ein "viðspælari" í sama mun sum áður.

Á Løgtingi, 28. september 2022

Steffan Klein Poulsen